# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Upprunaliga ætlaði eg mær at styðja Hillary Clinton, men eg varð ovfarin av Barrack Obama*
*(Eric Holder)*

# Somalisku sjórænararnir gera sum teimum lystir

**Hóast herskip úr fleiri londum eru á leiðini, kundu tey ikki forða somaliskum sjórænarum at ræna eitt fullfermt oljutangaskip**



*Saudiarabiska tangaskipið Sirius Star er fermt við olju fyri einar 600 milliónir krónur*
*(Mynd: Polfoto)*

Higartil hava teir somalisku sjórænararnir rænt handilsskip úti fyri somalisku strondini, men tilburðurin við tí saudiarabiska oljutangaskipinum vísir, at tey fremmandu handilsskipini kunnu heldur ikki kenna seg trygg úti fyri kenyansku strondini.

Men tilburðurin vísir eisini, at tað er neyðugt at finna eina loysn á tí 17 ára langa krígnum í Somalia, siga serfrøðingar. Tí uttan eina friðarliga og varandi loysn uppi á landi verður tað at kalla ógjørligt at steðga sjórænarunum, sigur Somalia-serfrøðingurin Roger Middleton á Chatham House í London við Reuters.

Tað risastóra oljutangaskipið bleiv rænt úti fyri kenyansku strondini fyrradagin. Hetta er tann størsti fongurin hjá teimum somalisku sjórænarunum higartil, og harafturat hava teir ongantíð rænt eitt skip so langt úr somalisku strondini sum hesaferð. Longu í gjár bleiv eitt skip rænt afturat. Hesaferð var tað eitt kinesiskt skip, sum var á veg til Iran við korni.

-Tað er heilt greitt, at sjórænararnir eru farnir at gera meiri um seg, og sum er hava vit ikki nóg mikið av herskipum har til at halda eftirlit við øllum økinum. Eftir mínum tykki ber tað heldur ikki til at loysa málið við hermegi, sigur Roger Middleton við Reuters.

### Sigldu framvið

Bæði NATO, ES og USA hava sent herskip til leiðirnar at verja handilsskipini, sum sigla tann vegin, men mánadagin sigldu sjórænararnir fram við herskipunum og rændu tað saudiarabiska tangaskipið úti fyri kenyansku strondini. Í gjár komu so boð um, at skipið lá fyri akkeri uttan fyri somaliska havnarbýin Haradhere, sum er norðan fyri høvuðsstaðin Mogadishu.

Teir somalisku sjórænararnir eru væl vápnaðir, og teir hava nógvar skjóttgangandi bátar. Vanliga mannagongdin er, at teir leggja upp á báðar síðurnar á handilsskipunum. Síðani skjóta teir ávaringarskot oman fyri brúnna, stundum við rakettum, fyri at ræða skiparan frá at royna at sleppa til rýmingar.

Teir flestu serfrøðingarnir eru á einum máli um, at tað ber ikki til at steðga sjórænarunum, so leingi lógloysi valdar uppi á landi í Somalia. Tað hevur eisini víst seg, at fleiri bólkar í Somalia vilja hava ágóða av sjórænaravirkseminum, sum hevur givið nógvar milliónir dollarar í loysigjøldum.

# Tann fyrsti litti løgmálaráðharrin



*Eric Holder var varaløgmálaráðharri hjá Bill Clinton*
*(Mynd: AP)*

**Vælvitandi keldur í demokratiska flokkinum vilja vera við, at Barrack Obama hevur valt fyrrverandi varaløgmálaráðharran Eric Holder til sín løgmálaráðharra**

Eric Holder var varaløgmálaráðharri hjá Bill Clinton, og eru tíðindi frá demokratiska flokkinum álítandi, fær USA ikki bara sín fyrsta litta forseta, men eisini sín fyrsta litta løgmálaráðharra.

Tann 57 ára gamli sakførarin segði herfyri, at undir demokratiska valstríðnum styðjaði hann fyrst Hillary Clinton, men at hann gjørdist so ovfarin av Barrack Obama, at hann broytti hugsan.

Sum løgmálaráðharri fær Eric Holder stóra ávirkan á, hvønn politikk USA fer at reka mótvegis yvirgangi og yvirgangsfólki. Eygleiðarar siga tó, at hansara høvuðsuppgáva verður at endurreisa álitið á løgmálaráðið, sum fleiri ferðir hevur verið í ringum sjógvi undir Bush forseta.

# Taliban boðið til samráðingarborðið

**Í næstum fara umboð fyri afghonsku stjórnina at tingast við Taleban um at fáa enda á bardøgunum**

Men útlitini eru ikki tey bestu, tí leiðslan í Taleban hevur sagt, at hon er ikki sinnað at tingast við stjórnina í Kabul, so leingi fremmandir hermenn eru í landinum. Teir eru í løtuni umleið 70.000 í tali, og teir skulu allir av landinum, áðrenn nakrar tingingar kunnu verða, sigur Taliban.

Hesum kravi hevur Hamid Karzai, forseti, víst aftur. Hann hevur boðið sær til at tingast við leiðaran hjá Taliban, mullah Omar, men hesin hevur higartil sagt nei. Men Taliban-rørslan er ikki samd, og afghanska stjórnin sigur seg hava vónir um at fáa samband við hóvligar bólkar í rørsluni og onkran av teimum ovastu leiðarunum.

Av teimum fremmandu hermonnunum í Afghanistan eru 32.000 amerikanarar, men amerikanski verjumálaráðharrin, Robert Gates, hevur sagt, at USA er til reiðar at góðtaka eina semju millum afghonsku stjórnina og Taliban. Harafturímóti fer USA ikki at góðtaka nakra semju, sum umfatar al-Qaeda, sum á ávísum økjum er rættiliga nær tengt at Taliban.

## STUTT SAGT

### Íslendsk misnøgd við svenskan ráðharra

Íslendska stjórnin er firtin um, at svenski fíggjarmálaráðharrin, Anders Borg, sigur seg sakna eina trúverduga búskaparætlan frá íslendsku stjórnini, áðrenn sviar kunnu ganga við til at læna Íslandi pening fyri at hjálpa landinum burtur úr fíggjarkreppuni.

Svenskir fjølmiðlar endurgeva ein týðandi íslendskan embætismann fyri at siga, at stjórnin í Reykjavík hevur staðfest, at sviar hava tikið eina heilt aðra støðu enn Noreg og Danmark, sum hava verið sera jalig. Íslendski embætismaðurin verður endurgivin fyri at siga, at »sviar elska ikki íslendingar líka nógv, sum hinir norðurlendingarnir gera«.

Svenska stjórnin hevur sagt seg vera til reiðar at veita Íslandi lán, men stjórnin hevur ikki sagt, nær hon fer at lata íslendingum lánið, ella hvussu stórt tað verður. Tað hevur ljóðað, at Svøríki bíðar eftir einari endaligari avgerð um lánið, sum Ísland hevur søkt Altjóða Gjaldoyragrunnin, IMF, um.

Tað hevur Anders Borg tó ikki sagt nakað um. Hann sigur seg sakna eina trúverduga búskaparætlan frá íslendsku stjórnini. Tey orðini eru ikki fallin í góða jørð í Íslandi, og Vísir skrivar, at tað eru íslendskir politikarar, sum hava hug at taka fyrispurningin um lán frá svium aftur.



*Anders Borg er svenskur fíggjarmálaráðharri*
*(Savnsmynd)*